# Liturin hevur mest at siga hjá kvinnum

**MÓTI** Tey flestu velja svarta litin, tá tey keypa nýggjan bil. Men fleiri og fleiri velja nú ein lit sum sæst aftur í landslagnum

Snorri Brend

Tendensurin er greiður: Fleiri og fleiri velja reyðar, bláar, brúnar og hvítar bilar.

Áður vóru tað serliga teir gráu og silvur-littu bilarnir sum vórðu mest seldir. Teir eru sjálvandi ovarlaga á sølulistunum, men fjarstøðan til tann bláa bilin gerst alsamt minni.

– Teir hvítu bilarnir, sum fyri 4-5 árum síðani vóru heilt úti, eru eisini á veg framaftur, vísa hagtølini.

### Litir ella megi

Fyrra hálvár í ár vóru teir grønu bilarnir, sum lógu á odda á móta- og sølulistunum fyri 10 árum síðani, keyptir av 530 norðmonnum.

– Liturin á bilunum hevur stóran týdning. Tað er kanska orsøkin til at bilverksmiðjurnar hava tað stóra og sterka litkortið frammi á teimum smærru bilunum, sigur Trond Blindheim, rektari á norska Markedshøyskolen.



**LITRÍKT**

*Liturin á bilinum hevur nógv at siga, serliga hjá kvinnum. Tað er kanska júst orsøkin til at bilverksmiðjurnar hava størsta og sterkasta litkortið frammi á teimum smærri bilunum*

Liturin sigur eisini nakað týdningarmikið um eigaran. Men hjá dreingjum hevur hetta kortini ikki so nógv at siga, tí teir hugsa meiri um orku og styrki í bilinum.

– Tað vísir seg, at fólk fyrst hyggja eftir hvat slag av bili, ein skal keypa – um tað er ein stationcar, fýrahjólstrektur bilur ella líknandi. Síðani verður hugsað um prís og merki.

– Í triðja lagi kemur liturin. Litavalið hevur týdning fyri mong, tí tað sendir út nøkur signal um eigaran, sigur Blindheim. – Ja, hann sigur eftir øllum at døma nógv um eigaran.

– Mín meting er, at gentur eru ikki so bangnar fyri at velja bilar við góðum, sterkum og sjónligum litum. Frágreiðingin er helst hon, at gentur hava størri sans fyri, hvussu tingini síggja út enn dreingirnir.

**Gentur er ikki so bangnar fyri at velja bilar við góðum og sjónligum litum**

FTZ
BILLUTIR & AMBOÐ P/F
Hankook
Viking
Tórshavn 611010
Kambsdalur 611020
Veitarin til bilmarknaðin
Sosialurin 341800

# Ætlaði at bakka 30 km til hús

Snorri Brend

**Noreg**: Ein mikudag í farna mánaði endaði norska løgreglan í eini heldur sjáldsamari støðu: Teir steðgaðu nevniliga einum bilførara, ið ætlaði at bakka einar 30 kilometrar gjøgnum Gudbrandsdalen, norður til heimstað sín, Tretten.

Maðurin koyrdi við einum gomlum Mercedes-bili, men hesin var als ikki egnaður ella góðkendur til ferðslu á almennum vegi.

Tá løgreglan steðgaði manninum í tí bakkandi bilinum, og undraðu seg um, hvagar hann ætlaði sær, fall svarið beinanvegin: "Heim til Tretten!".

Bilførarin greiddi frá, at gearkassin í bilinum var í ólagi, og at tað bara var bakkgearið sum riggaði nøktandi.

Løgreglan hevði tó lítla samkenslu fyri ynskinum hjá manninum um at sleppa til hús á henda hátt, og gav honum koyriforboð á staðnum. Nummarspjøldrini vórðu snøgt sagt klipt av bilinum, eins og myndin vísir.

– Hetta slagið av atferð í ferðsluni er als ikki í samsvar við lógarverkið, sigur Edmund Tofthagen, ið arbeiðir í politi-økinum í Gudbrandsdalen.

Í grein 3 í norsku ferðslulógini stendur, at bilførarar eiga at ferðast "hensynsfullt og aktpåliggende".

Bilførarin var hinvegin ikki serliga fegin um avgerðina at seta bilin, men boygdi seg kortini fyri kravinum frá løgregluni.

– Hann hevði einki val. Slíkt tjakast vit ikki um. At bakka til hús, er ikki loyvt, sigur Tofthagen við norskar fjølmiðlar.



## – Passar ikki

– Hetta er bara tvætl. Eg ætlaði als ikki at bakka so langt, sum løgreglan sigur, vísir maðurin á.

Norskir miðlar hava skrivað nakað um hendingina, og eitt av bløðunum hevur ómakað sær at fáa eina viðmerking frá manninum.

Hann sigur stutt við blaðið, at hann veruliga ætlaði at bakka, men ikki til hús. Í roynd og veru ætlaði hann bert at bakka bilin ein munandi styttri tein, til eitt bilverkstað ið lá har um vegir.

– Eg hevði so ongar trupulleikar av at bakka soleiðis við eini ferð uppá bert 40-50 km/t.

– Eg koyrdi við ávaringarljósunum tendraðum, so eg var ikki til vanda fyri nakran í ferðsluni, greiðir maðurin frá.